## Grønland býtast í vinnuøki



Í Grønlandi hevur flokkurin IA nú skotið upp at býta landið sundur í fimm partar, tá talan er um at leggja ætlanir fyri arbeiðsmarknaðin og búskapin. Tað var formaðurin, Kuupik Kleist, sum kom við uppskotinum á landsfundinum hjá IA í býnum Paamiut í gjár. Í røðu síni fyri landsfundinum segði Kuupik Kleist, at tað er umráðandi at menna arbeiðsmarknaðin og búskapin eftir teimum fyritreytunum, sum eru kring landið. Hann legði dent á, at IA vil hava alt fólkið til at taka lut í orðaskiftinum um ætlanina. Tey fimm økini, sum IA skýtur upp, eru Eysturøkið, Suðurøkið norður til Paamiut, Miðøkið frá Nuuk til Kangaatsiaq, Diskovíkin og Norðurøkið.

## Færri fáa krabbamein

Í mong ár hava hagtølini hjá danska Heilsustýrinum víst, at altsamt fleiri danir hava fingið staðfest krabbamein, men nú vísa tey nýggjastu tølini, at gongdin er vend. Tølini hjá Heilsustýrinum vísa, at í 2007 vórðu 32.511 nýggir tilburðir av krabbameini staðfestir. Tað var heldur meiri enn árið fyri, men verður vøksturin í fólkatalinum tikin við í roknistykkið, er tann keðiliga gongdin steðgað, sigur Heilsustýrið. Hans Henrik Storm, sum er yvirlækni hjá danska krabbameinsfelagnum, sigur við DR, at tað er ov tíðliga at klappa enn, tí tað er neyðugt at kanna tølini í nøkur ár afturat, áðrenn tað ber til at siga við vissu, at gongdin er vend. Jakob Axel Nielsen, heilsumálaráðharri, fegnast um tey nýggju tølini og sigur seg vóna, at tann jaliga gongdin fer at standa við.



# Býráðið samtykt Boðanesheimið

**Tað hevur ligið í luftini hesa seinastu vikuna, eftir at Rósa Samuelsen gav Heðini Mortensen lyfti um, at kommunan fær stuðul frá landinum, at býráðið fór at samtykkja nýtt røktarheim yviri við Strond**

BOÐANESHEIMIÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tórshavnar býráð hevur leingi arbeitt við ætlanunum um eitt røktarheim yviri við Strond. Upprunaliga varð ein kapping um projektið útskrivað, og ein donsk arkitektafyritøka vann hesa kapping. Men prísurin var einki at rópa hurrá fyri, umleið tvær milliónir krónur fyri hvørja búeind.

Síðani tað hava fleiri teknistovur verið frammi við nýggjum verkætlanum, har prísurin varð skorin niður í helvt. Onkur av hesum verkætlanum hevur verið umrødd her í blaðnum áður.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, hevur alla tíðina víst á, at sum tíðirnar eru, megnar kommunan ikki sjálv at fremja hesa byggingina.

- Sjálvt um vit ofta hava tikið uppgávurnar hjá landinum á okkum, so eru fíggjarligu líkindini í dag soleiðis, at vit ikki megna hesa byggingina einsamallir, hevur Heðin Mortensen áður sagt í Sosialinum.

Í síðstu viku frættist so, at Rósa Samuelsen, almannamálaráðharri, á fundi við borgarstjóran í Havn hevði lovað Heðini Mortensen, at hon vildi syrgja fyri, at kommunan fekk stuðulin, sum lógin ásetur, um farið verður undir at byggja røktarheim í kommununi.

### Staðfestur tørvur

30. apríl í ár hevur løgtingið samtykt nýggja lóg um studningslán til bygging av ellis- og røktarheimum, sum heimilar kommununum at fáa upp til 50% av byggikostnaðinum í stuðli, tó í mesta lagi 700.000 krónur fyri hvørt búfólk.

Lógin áleggur Almannamálaráðnum at viðgera umsóknirnar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum í økinum.

Tørvurin á røktarheimsplássum í Suðurstreymi fer sambært hagtalsmetingum hjá Hagstovuni helst at økjast í framtíðini. Sum er, eru 145 persónar visiteraðir til eldrabústovn, og av teimum hava umleið 75 bráðneyðugan tørv.

Almannamálaráðið hevur í skrivi til KSF og FKF (kommunufeløgini) heitt á kommunurnar um innan 1. juli at koma við umsóknum um stuðul til røktarheimsbygging.

Sambært meting, sum teir báðir samgonguflokkarnir í Tórshavnar býráð hava gjørt, eigur kommunan at byggja røktarheim til 64 búfólk, treytað av, at landið veitir stuðul til helvtina av byggikostnaðinum.

### Boðanesheimið

Sosiala nevnd mælti eftir fund tann 9. juni til, at søkt varð um stuðulslán til bygging av 64 búeindum yviri við Strond.

Samstundis varð heitt á umsitingina at gera eina byggiskrá til ætlaða røktarheimið og at játtaðar vórðu 200.000 krónur til hetta endamál.

Fíggjarnevndin samtykti 17. juni at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

Á býráðsfundinum í gjárkvøldið vóru tað bert Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd, og Inga Dahl, ið var á fundi fyri Jan Christiansen, ið tóku orðið.

Halla Samuelsen heitti á allar býráðslimir um at taka undir við tilmælinum, meðan Inga Dahl heitti á býráðið um at geva heiminum eitt navn, so tað slapst undan ivamálum, tá heimið verður umrøtt.

Tað kom eisini fram, at Jógvan Arge longu hevur skotið upp, at heimið verður nevnt Boðanesheimið, og tað tóktist, sum býráðslimir dámdu væl hetta heiti.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, vísti á, at tað er umráðandi, at fáa sent umsóknina inn áðrenn tíðarfreistin er úti, tí fleiri aðrar kommunur – eitt nú Vágs og Klaksvíkar kommunur – hava boðað frá, at tær ætla at fara undir eldrabygging í nærmastu framtíð.

Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd, fegnast um, at uppskotið varð einmælt samtykt.

- Tað fløvar at kenna, at alt býráðið er samt um hesa ætlanina, sigur Halla Samuelsen.

# Íslendingar gista privat í Gøtu

**Í morgin skipar Eystur kommuna fyri tiltaki á bryggjuni, har íslendingar, sum eru á vitjan í Føroyum, fáa høvi at heilsa upp á gøtufólk og onnur. Um kvøldið verður døgurði í Gøtubráð**

GØTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrrverandi Gøtu kommuna, sum saman við gomlu Leirvíkar kommunu myndar Eystur kommunu, fær nú vitjan úr Vestmannaoyggjum í Íslandi.

Gøta kommuna hevði vinarbýarsamband við Vestmannaoyggjar, og nú fleiri fólk úr bjargingarfeløgum í oyggjunum eru í Føroyum, vilja gøtufólk gjarna vísa grannafólkinum fyri vestan sítt gestablídni.

Meðan gamla Gøtu kommuna hevði vinarbýarsamband við Vestmannaoyggjar, hevði Leirvíkar kommuna eitt nú vinarbýarsamband við Borgarfjørðin í Íslandi.

Hesi sambond "yvirtekur" Eystur kommuna, nú kommunurnar báðar eru lagdar saman í eina eind.

Gøtumaðurin, Martin Juul Jarnskor, hevur eins og fleiri onnur gøtufólk havt rættiliga gott samband við fólk í Vestmannaoyggjum, og sum skilst, er tað ikki minst hann, sum er íspinnarin til, at Eystur kommuna leygardagin fer at skipa fyri tiltaki í Gøtu fyri íslendsku gestunum.

Hanna Jensen, sum er formaður í trivnaðarnevndini hjá Eystur kommunu, sigur, at tey fegin vilja, at borgarar í Gøtu fáa samband við íslendingarnar, nú teir kortini eru á vitjan í Føroyar, her teir hava ferðast um oyggjarnar í bjargingarbátum.

- Vit ynskja at vísa hesum fólkum blíðskap og fara tí leygardagin klokkan 14 at skipa fyri móttøku við Torvaldskassi, har neystini standa omanfyri bryggjuna. Við móttøkuna fer onkur at siga nøkur orð, her verður sangur og okkurt til matna. Høvi verður sjálvsagt eisini til prát og samveru. Seinni um kvøldið bjóða vit íslendingunum til døgurða í Gøtubráð, sum er eldrasambýlið í Norðragøtu.

Hanna vísir á, at gøtufólk hava eisini skipað so fyri, at íslendingarnir sleppa at búgva privat hjá fólki í Gøtu í tveir dagar.

- Vit hava soleiðis útvegað hesum fólkum pláss hjá privatfólki ymsastaðni í bygdini, og kanska endar onkur eisini í Leirvík. Einar 10 konur hjá hesum monnum koma heim úr Íslandi við flogfari í dag, og hesar koma so eisini at gista privat í Gøtu – saman við monnum sínum.

Formaðurin í trivnaðarnevndini í Eystur kommunu sigur, at tey við hesum vilja vísa íslendingum gestablídni, sum grannarnir fyri vestan sjálvir eru so óførir til, tá føroyingar vitja har yviri.

- Á hesi ferðini í Føroyum eru eingi kommunal umboð við úr Vestmannaoyggjum, men vit í Eystur kommunu vóru í oyggjunum á vitjan síðsta heyst í sambandi við okkara kommunusamanlegging.

Hanna Jensen sigur, at nært samband hevur verið millum Gøtu og Vestmannaoyggjar í nógv ár, og tað er ikki so sjáldan, at fólk úr oyggjunum – bæði ungdómar og vaksin – hava arbeitt í Gøtu í summarfrítíðini. Haraftrat hevur nært samband verið millum fótbóltsfeløgini í Gøtu og Vestmannaoyggjum.

- Vit eru sera fegin um at fáa hetta høvi, sum vit halda hevur stóran týdning fyri framhaldandi sambandið millum Gøtu og Vestmannaoyggjar, leggur hon aftrat.